# Iveco framsýning á G-8

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Italsku Iveco bilarnir høvdu ein stóran leiklut á G-8 toppfundinum í L'Aquila í Italia í summar, har tilsamans 2.500 fundarluttakarar, harímillum fleiri av heimsins leiðandi politikarum, umframt umleið 800 tíðindafólk úr øllum heiminum luttóku.

Luttakararnir vóru koyrdir í tilsamans 80 Iveco bussum: 50 stórum og 30 minibussum.

Í sambandi við at dálking og veðurlagsbroytingarnar vóru høvuðsevnið á fundinum, vóru teir nýggju framkomnu Iveco EcoDaily við elmotori sýndir fram og royndarkoyrdir saman við teimum vitjandi.



*G-8 toppfundurin var í L'Aquila í Italia við luttøku av fleiri av heimsins leiðandi politikarum*




*Iveco EcoDaily við elmotori vóru sýndir fram og royndarkoyrdir saman við teimum vitjandi*



*Á myndini eru tey fýra bilmerkini í Auto Union, sum umboða ringarnar í búmerkinum hjá Audi: Aftast frá vinstru eru ein Horch 830 BL frá 1938 og ein Wanderer W25K frá 1937. Fremst frá vinstru er ein DKW3 = 6 frá 1953 og ein Audi 225 frá 1936. Í miðjuni er ein NSU Prinz 30 frá 1959. NSU var eisini partur av Auto Union*

# Audi 100 ár

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Hundrað ár eru liðin síðan fyrsta Audi bilverksmiðjan varð stovnað í Týsklandi í 1909.

Audi vóru gjørdir fram til seinna verðaldarbardaga, tá framleiðslan steðgaði við árgangi 1939.

Síðan varð eingin Audi framleiddur fyrr enn í 1965, tá Volkswagen árið fyri, í 1964, høvdu keypt týsku Auto Union verksmiðjuna í Ingolstadt, sum tá framleiddi DKW.

Audi hava framvegis teir fýra ringarnar frá Auto Union sum búmerki. Ringarnir standa fyri fýra bilmerkir: Audi, Horch, DKW og Wanderer, sum løgdu saman til Auto Union í 1932.




*Fiat í Brasilia hátíðarhalda at teir hava framleitt 10 milliónir bilar síðan 1976*

# 10 milliónir Fiat

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Brasilia er ein risastórur marknaður hjá Fiat, sum nú hevur framleitt 10 milliónir bilar á verksmiðju síni í Belo Horizonte í Brasilia, síðan framleiðslan byrjaði í 1976.

Stóra framleiðslan av bilum í landinum er ein orsøk til at Fiat hava ein marknaðarpart upp á umleið 25 prosent í Brasilia.

Fiat er mest selda bilmerki í Brasilia, framman fyri Volkswagen og General Motors sum eisini hava egnar verksmiðjur í landinum. Fiat framleiða 15 ymisk bilmodell í Brasilia.